

*Leon er ein smartur og rúmligur familjubilur við sportsligum koyrieginleikum. leggið til merkis at hurðahandtakini til bakhurðarnar eru fjald í aftastu síðurútunum.*

Seat Leon 2005:

# Smart design og sportsligir koyrieginleikar

**Í heyst kemur aftur ein nýggjur Seat á marknaðin. Hesaferð verður talan um Seat Leon í heilt nýggjari útgávu. Motorjournalistar, sum hava royndarkoyrt bilin í Spania, geva Leon sítt besta viðmæli**

BILAR
*Magnus Gunnarsson*
*maggi@sosialurin.fo*

Nýggi Seat Leon er eins og Seat Altea og Toledo teknaður av kenda bildesignaranum Walter de Silva. Allir hesir bilarnir líkjast og hava sermerkta designið hjá nýggju Seat-generatiónini. Seat er sportsliga bilmerki hjá VW-konsernini.

Leon er ein smartur og rúmligur familjubilur við sportsligum koyrieginleikum. Í mun til forgangaran er nýggi Leon væl størri og rúmligari.

Fimm motorar eru at velja ímillum, tveir bensin og tveir diesel. Bensinmotorarnir eru: 1,6 litur við 102 hk, og 2,0 litur FSI við 150 hk og ein FSI við 185 hk. Dieselmotorarnir eru: 1,9 litur TDI við 105 hk, og 2,0 litur við 140 hk.

Næsta ár koma tvær útgávur afturat, Leon FR og Leon Cupra við 2,0 litur TFSI-motorum við ávikavist 200 og 225 hk.

Leon hevur ESP sum standard eins og differentialesperru og bremsuassistent. BSW-skipanin heldur bremsuskivurnar reinar og fríar fyri vatn, og TSC-antispinn er ein partur av ABS-bremsuskipanini.

Motorjournalistar, sum hava royndarkoyrt bilin í Spania, siga, at nýggi Leon er bæði sportsligur at koyra og góður at sita í - setrini eru nakað heilt fyri seg. Eins og á t.d. Alfa Romeo 156 sita hurðahandtakini til bakhurðarnar eru fjald í aftastu síðurútunum - smart.

Nýggi Seat Leon kemur á marknaðin í heyst. Prísin vita vit einki um enn.

## Seat Leon 1,6

| | |
|---|---|
| Motorurin | 1,6 litur bensin 102 hk |
| 0-100 km/t | 11,7 sek |
| Bensinnýtsla | 13,3 km/l |
| Dekkstødd | 205/55-16 |
| Stødd og vekt | |
| Longd | 432,0 cm |
| Breidd | 177,0 cm |
| Hædd | 146,0 cm |
| Eginvekt | 1.300 kg |
| Viðførisrúm | 341 litrar |
| Søluumboð | |
| | Bilasølan<br>Vegurin Langi<br>FO-188 Hoyvík<br>Tel. 315354<br>www.bilasolan.fo |




*Nýggi Seat Leon er teknaður av kenda bildesignaranum Walter de Silva.*



*Allir teir nýggju Seat líkjast og hava sermerkta designið hjá nýggju Seat-generatiónini*



*Seat Leon er bæði sportsligur at koyra og góður at sita í - setrini eru nakað heilt fyri seg*